

Johan Mortensen og Magni Arge fóru í 1993 á heimsins størstu oljumessu í Houston, Texas. Stutt eftir hetta stovna teir saman við Alva Nielsen og Paula Einarsson, Føroya Oljuídnað. Úr bókini "OLJAN".

# Føroyska oljuvinnan aftur á einum vegamóti, hvat gera vit nú?

Deil:

Jan Müller

05.12.2014 - 12:06

Oljan.fo

Kjak um oljumál

Johan Mortensen

"Fyrst vil eg ynskja Jan Müller og Trónda Djurhuus tillukku við áhugaverdu og frálíku bókini OLJAN um hesi 25 árini, sum, hóast vit ikki enn hava funnið rakstrarverdar nøgdir av olju, kortini hava skapt eina frálandsvinnu, ið gevur eitt stórt íkast til okkara búskap.

Næstan um somu tíð sum OLJAN kemur út, letur STATOIL flestu av sínum loyvum aftur til Jarðfeingi. Hetta var væntandi men spell kortini og kann eg m.a. nevna, at landskassin missir fleiri tíggjutals mió. kr í víddargjaldi av hesum økjum um árið.

Er so bókin um oljuna gravsteinurin um eina føroyska oljuvinnu ella eitt ávegis bókaverk?

Latum okkum taka tað positiva fyrst: Vit eru 100 % sannførd um, at olja og gass er á okkara øki! Trupulleikin er nógva basaltið. Okkara olju- og gass goymslur (reservoir) liggja djúpt, og harav er reservoirgóðskan ikki altíð líka góð (td. Marjun økið sum ER eitt oljufelt). Framvegis er ov lítið til av seimiskum tilfari, sum fer undir basaltfláirnar.

Føroyska lóggávan um, hvussu ein oljuvinna verður skattað, er ikki attraktiv fyri oljufeløg orsakað av nevndu basalttrupulleikum.

· Jarðfeingi fær allarhelst lítið burturúr at fara út nú at marknaðarføra okkum, uttan tey hava nýggj og meira seismisk data við sær. Jarðfeingi hevur avrit av øllum seismikki á føroyska økinum, og eg veit ikki, hvat tey hava loyvi at almannakunngera men kanska eitt uppskot er, at tær milliónir, sum standa i Sindri, verða nýttar til “interpretation”, tulking av hesum tilfari og so marknaðarføra tey. Uttan iva hava kinversk, japonsk, og russisk oljufeløg áhuga í okkara øki, sum liggur næst Rosebank og hinum økjunum vestan fyri Hetland, WOS. Vit mugu eisini hugsa um onnur oljufeløg enn tey vit kenna, oljuheimurin er stórur.

· Vinnumálaráðið má endurskoða oljulóggávuna og gera hana meira áhugaverda, so at oljufeløg td., gjalda minni í skatti, um olja verður funnin.

· Gjaldið til førleikamenning skal strikast

· Kravið um føroyskan bryggjukant skal strikast

· Nógv fleiri nýggjari og betri seismisk data mugu fáast til vega.

Myndugleikarnir mugu vekja áhugan hjá seismiska ídnaðinum at koma aftur at skjóta meira seismikk og eyðmerkja økini, har basaltið er tynst, og soleiðis aftur økja áhugan hjá oljufeløgunum fyri okkara øki, tí oljan og gassið eru her!

Við lækkandi oljuprísum mugu vit gera okkum greitt, at oljufeløgini ídag seta stór krøv til realismu og langtíðarplanlegging, so tað verður uttan iva ein tíð, áðrenn sett verður aftur á at bora hjá okkum.

Tað er kortini væntandi, at nógv fer at henda beint sunnan fyri markið næsta ár, tá fleiri olju- og gassfelt koma “on stream” og gevur hetta stórar møguleikar fyri okkara frálandsvinnu og oljubasa, tað er bara at halda seg framat!

Draga vit øll eina línu og í semju og realismu tosa um, hvussu vit fara víðari, eri eg sannførdur um, at ein dag fara vit at hava eina olju og gassvinnu hjá okkum. Bókin OLJAN sýnir, at vit hava lagt støðið, og at vit kunnu fóta okkum í hesari vinnu."

**Johan Mortensen**